Thor klárt til oljuleiting

Lýkur nú øll trygdarkrøv

Jan Müller

Um somu tíð sum føroyskir myndugleikar renna kapp við tíðina fyri at fáa eina tílbúgving klára til fyrsta boringin byrjar á landgrunninum, fyrireikar privata vinnan seg eisini til hesa leiting, og eisini hon hevur fyri neyðini at hava síni viðurskifti í lagi, eitt nú á trygdarøkinum. Ein av fyritøkunum, sum er púra klár til komandi leiting er reiðaríið Thor í Hósvík. Felagið, sum í løtuni rekur 8 skip, harav tey flestu eru í offshorevinnuni, fekk herfyri endaliga bláa stempulið í sambandi við trygd, nakað, sum hevur alstóran týdning fyri at fáa góðar avtalur.

Herfyri var regionstjórin í Norsk Veritas, Peter Bjerager og økisleiðarin fyri Føroyar Andrass Joensen, í Hósvík og handaðu P/F THOR váttan fyri ISM og ISO 9002. Hetta merkir, at P/F THOR í Hósvík nú er certificerað samsvarandi bæði ISM-Coduni og samsvarandi ISO 9002.

Felagið rekur skip og skipatænastur innan offshorevinnu og hevur hetta seinasta árið lagt nógva orku í at fáa eina vælvirkandi góðskuskipan uppbygda, soleiðis at fyritøkan er væl fyri til tað komandi leitivirksemið á føroyskum øki.

Felagið fór undir góðskuskipanina við atliti til ISO 9002 góðkenning, men valdi skjótt at fáa arbeiðið umborð lagt tilrættis samsvarandi ISM-Coduni, ið er ein trygdar- og umhvørvisskipan innan skiparakstur, sum part av góðskufyriskipanini. Mett varð at ISM-codan var ein neyðugur partur av eini ISO 9002 goðkenning fyri skip, sum skal røkja tænastur innan offshorevinnu, herundir flutning av fólki.

"International Safety Management (ISM) Code", krevur, at eitt reiðarí og tess skip verða rikin samsvarandi eini góðkendari trygdarskipan. Hendan trygdarskipan skal tryggja, at starvsfólk og manningar hjá reiðaríinum virka samsvarandi fastløgdum trygdar- og umhvorvisverndarfyriskipanum. Tann 1. juli 1998 skuldu øll ferðafólkaskip og tangaskip og teirra reiðaríir vera ISM-góðkend. Farmaskip størri enn 500 BRT o.o. skulu hava samsvarandi góðkenning innan 1. juli 2002. M/S Tórsvík er undir 500 BRT og er góðkenningin tí ikki eitt lógarkrav.

ISO standardir eru altjóða fyriskipanir, sum eru grundaðar á, at øll arbeiðir verða gjørd eftir einum fastløgdum leisti. ISO 9002 er ein góðskufyriskipan, sum ásetur, hvussu arbeiðið skal tilrættisleggjast, soleiðis at góðskan gerst jøvn. Skipanin er uppbygd av ymiskum mannagongdum, sum m.a. bera í sær at fyribyrgja og læra av mistøkum. Í Føroyum eru bert einstakar fyritøkur ISO 9000 góðkendar.

ISO góðskugóðkenningar verða ofta nýttar sum prógv fyri, at fyritøka hevur eitt gott arbeiðslag og at dygd er í virkseminum. Hetta er tað, sum felagið THOR ynskir at staðfesta við góðkenningini, soleiðis at felagið eisini í framtíðini kann varðveita nøgdar kundar sigur Gunnbjørn Joensen, annar av stjórunum í felagnum.

Frá hátíðarhaldinum, tá Thor fekk síni certifikat inan trygd. Fv. Peter Bjerager, stjóri í Norsk Veritas, teir báðir brøðurnir Gunnbjørn og Andreas Joensen, økisleiðarin fyri Føroyar hjá NV, Andras Joensen og síðani tær báðar, Sue Philbrow og Johanna Olsen, sum starvast á skrivstovuni hjá Thor. Mynd Jens K. Vang

Felagið er vorðið ISM og ISO 9002 góðkent av Norsk Veritas og er hetta fyrstu ferð Norsk Veritas hevur veitt bæði ISM og ISO 9002 góðkenning samstundis til eitt felag.

Gunnbjørn Joensen sigur við Sosialin, at manglandi certifisering hevur ligið sum ein forðing, tá man skal bjóða seg fram í kapping við aðrar. Summi feløg eru so konsekvent, at tey siga, at tey feløg, sum ikki hava kvalifiseraða góðskustýring, sleppa ikki við. Her er serliga talan um feløg uttan fyri Noreg.

Smyril Line hevur fingið ISM-góðkenning og Strandferðslan, meðan Thor er tað fyrsta sum hevur báðar góðkenningar.

Gunnbjørn Joensen heldur, at trygdargóðkenningarnar koma at lata upp fyri nógvum møguleikum, her og úti. Síðani teir fingu góðkenningina, hava teir fingið fleiri góðynski.

Annars hava teir hava úr at gera í løtuni. Teir hava siglt við grønlendskum og føroyskum skúlanæmingum umframt at vera uppi í bæði fiskivinnu og oljuvinnu. Í løtuni hava teir 8 skip. Tvey av teimum eru leigað. Tvey eru í fiskivinnuni. Restin hevur offshoreuppgávur.

Teir royna at fáa samband við feløg, sum ætla at vera undan fyrstu leitingini, tey kontakta eisini Thor. Her er talan um feløg, sum arbeiða innan offshore. Eisini verður arbeitt við øðrum tingum.

Gunnbjørn Joensen roknar við, at teir fara at leiga skip, tá leitingin byrjar við Føroyar. Tá verða eisini størri krøv sett.

-Vit hava nakrar royndir og eitt kent navn. At myndugleikarnir so vilja hava at útlendsku fyritøkurnar brúka føroyskar vørur og tænastur, sum eru kappingarførar og liva upp til krøvini, ið eru til slíka vinnu, kann bert vera gott. Vit bjóða okkum fram at vera við sigur Gunnbjørn Joensen.

Ole Dietz, stjóri í Maersk Air um prísútspælið hjá Finnboga Arge:

– Hetta er ein lítil kollvelting

Jan Müller

Nógv bendir nú á, at tað hereftir er lagt upp til rættiliga prískapping á flogrutuni millum Føroyar og Danmark. Í gjár gjørdi Finnbogi Arge, landsstýrismaður av at ganga einum ynski hjá Maersk Air á møti. Felagið bað um loyvi til at kunna lækka prísirnar á Føroyarutuni nú undan páskum og seinni eisini. Tað er danska ferðslumálaráðið, sum skal góðkenna prísirnar, men mannagongdin hevur verið tann, at tað fyrst spyr seg fyri hjá føroyskum ferðslumyndugleikum. Brævið frá Vinnumálastýrinum til Ferðslumálaráðið er soljóðandi:

Ole Dietz, stjóri í Maersk

„Med henvisning til korrespondance vedr. Maersk Air´ ansøgning og godkendelse af påske- og forårskampagnepriser på ruten mellem Færøerne og Danmark, skal hermed meddeles, at Finnbogi Arge, erhvervsminister, kan tilslutte sig en godkendelse af kampagnepriserne.“

Stjórin í Maersk Air, Ole Dietz, er sera fegin um nýggjasta útspælið frá føroyskum myndugleikum. - Hóast hetta er tað vit høvdu roknað við, so er tað ikki sørt av eini minni kollvelting eisini.

Ole Dietz staðfestir, at man nú hevur tvey feløg, sum røkja føroyaflúgvingina, tvey feløg, sum eru heilt óheft av hvørjum øðrum og nú eisini sæð í relatión til myndugleikarnar. Tað ger, at feløgini nú frítt kunnu disponera, og tað heldur hann vera sera positivt, eisini fyri Atlantic.

Stjórin í Maersk Air vísir á, at skipanin higartil hevur verið stýrd. Nú eru so tikin stig til broytingar, sum hann eisini heldur vera náttúrligt, tí einki stendur í stað. Hann skilur eisini væl, at hetta kemur eitt sindur óvart á kappingarneytan. Men í síðsta enda heldur hann, at hetta eisini fer at gagna tí føroyska flogfelagnum.

Fyrr hava feløgini avtalað kampanjuprísir. Við avgerðini hjá Finnboga Arge er tað nú upp til bæði flogfeløgini at tillaga seg til útboð og eftirspurning. Tað gevur størri fleksibilitet og má eisini geva betri útboð til ferðafólk. -Man kann væl siga, at hetta er ein kollvelting, men tað kollveltandi liggur í tí, at nú verður ein meira liberal støðutakan til viðurskiftini. Tað merkir so, at tað nú eisini kemur „action“ aftanfyri orðini, tí bæði her og eisini í Føroyum hevur tað verið nógv tosað um liberalisering. Og nú hava vit so eitt av úrslitunum.

Ole Dietz vil ikki her og nú lova nakað. -Tað veldst um útviklingin. Vit skulu eisini reka eina forrætning.

Hann vísir annars aftur úttalilsunum hjá stjóranum í Atlantsflogi um, at prísirnir eru órealistiskir og at meta sum dumping. -Skilja bæði feløgini at kappast uppá ein fair hátt, so kann eg ikki síggja tað øðrvísi enn, at hetta eisini verður ein fyrimunur fyri Atlantic. Her mugu vit eisini hugsa um tann økta eftirspurningin, sum helst fer at verða á rutuni í framtíðini.

Ole Dietz sigur, at við útspælinum frá landsstýrinum í hondini fara teir nú eisini at hyggja at møguleikanum fyri at bjóða føroyingum bíligar pakkaferðir til onnur lond.

Hvørja viðmerking hevur Maersk-stjórin til teir føroyingar, sum bera ótta fyri, at frí prískapping skal taka grundarlagið undan Atlantsflogi og harvið seta Maersk - við AP Møller samtakinum í rygginum - í aftur sína gomlu monopolstøðu?

-Lat meg fyrst siga, at Maersk Air rekur sína egnu forrætning. Vit hava ikki nakran aftanfyri okkum,ið kann hálpa, um vit koma í trupulleikar. Um onkur heldur hetta hevur so stóran týdning í hesum máli, so kann man væl eisini siga, at Atlantsflog hevur føroyska landskassan aftan fyri seg.

Ole Dietz leggur aftrat, at teir hava ongar visiónir um, at hetta skal vera tann stóri, sum kvalir tann minna.

„Atlantic kan godt selv, det har de jo bevidst“ sigur Ole Dietz, sum ikki er ikki minsta iva um, at tað er pláss fyri tveimum flogfeløgum á Føroyarutuni.

Stjórin í Atlantsflog segði við útvarpið í gjár, at avgerðin hjá Vinnumálaráðharranum møguliga var ikki umhugsað nóg væl. Hann setti spurnartekin við framtíðar gongdina hjá Atlantsflogi og ávaraði móti eini gongd,ið kann taka grundarlagið undan føroyska felagnum, og at vit enda aftur í eini monopolstøðu.

Ítróttur
e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Nú ver›ur ta› álvari í steypakappingini

Løgmanssteypi›: Nógvur fótbóltur ver›ur á skránni komandi dagarnar, tá grei›a ver›ur fingin á, hvussu li›ini skulu hittast í fjór›ingsfinaluni

Hóast tveir tri›ingar av dystunum í kappingini um løgmanssteypi› skuldu havt veri› fingnir frá hondini, so er framvegis óvist, hvussu li›ini fara at hittast í fjór›ingsfinalunum. Men nú sær ta› út til – eftir at B36 og NSÍ snáva›u og HB hálvsnáva›i tí›liga í kappingini – at øll li›ini, sum í fjør stó›u seg best í landskappingini, fara at halda fram í fjór›ingsfinaluni.

Teir f‡ra dystirnir í fjór›ingsfinaluni skulu sambært skránni spælast sunnudagin 21. mai. Teir tríggir bólkavinnararnir skulu spæla á heimavølli, og næstbesta li›i í bólki tvey skal eisini spæla á heimavølli.

B68 hevur uttan iva tryggja› sær fyrst plássi í bólki tvey. Ta› vil vi› ø›rum or›um siga, at teir skulu spæla á heimavølli í fjór›ingsfinaluni, men harvi› er ikki sagt, at uppgávan ver›ur løtt hjá teimum.

Lutakasti› hevur laga› ta› solei›is, at teir skulu spæla móti næstfremsta li›num í í bólki eitt. Ta› ver›ur KÍ ella NSÍ.

At ta› framvegis er rættuliga ógreitt, hvussu li›ini skulu spæla í fjór›ingsfinaluni kemst av, at fleiri dystir framvegis eru útsettir. Sunnudagin skuldu vágbingar havt veri› í Klaksvík, men tann dysturin var› útsettur, tí ta› var so nógvur kavi á vøllinum í Klaksvík.

Frammanundan áttu bæ›i KÍ og VB ein dyst á. Vágbingar hava ikki spælt í Sumba, og KÍ hevur ikki spælt í Runavík. Sambært formanninum í kappingarnevndini hjá FSF, Børga B. Hansen, so er ætlanin at dysturin millum NSÍ og KÍ skal spælast í kvøld klokkan sjey. Nær hinir dystirnir, sum eru útsettir, ver›a spældir, var ikki greitt í gjár. Men ta› er greitt, at ta› fer ikki at bera til at spæla allar teir útsettu dystirnar, á›renn ta› 2. páskadag ver›ur fari› undir landskappingina.

Eingin trupulleiki ver›ur at fáa dystin millum Sumba og VB avgreiddan. Stóri trupulleikin ver›ur at finna pláss fyri dystinum millum KÍ og VB.

Sí›stu dystirnir

Sambært skránni eru dystir í bólkaspælinum á skránni bæ›i skírisdag og páskaaftan. Ve›urvánirnar hava ikki veri› naka› serligar. Hann hevur tosa› um høgætt og kava, men um ve›ri›, sum var í gjár, ver›ur í skírishalguni og heldur sær til leygardagin, so ver›a eingir trupulleikar.

Dystirnir skírisdag eru hesir: Bólkur 1: KÍ–Sumba og NSÍ–VB, bólkur 2Ø B71–B36 og B68–ÍF, bólkur 3: HB–GÍ og FS Vágar–TB. Og páskaaftan sær skráin solei›is út: Bólkur 1: KÍ–NSÍ og VB–Sumba, bólkur 2: B36–B68 og ÍF–B71, bólkur 3: GÍ–FS Vágar og HB–TB.

Landskappingin

Komandi vikuskifti ver›ur fyrsta umfari› í landskappingini spælt í 1. og 3. deild. Ta› ver›ur ikki spælt í 2. deild fyrrenn anna› vikuskifti.

2. páskadag er skráin í 1. deild henda: B68–FS Vágar, B36–GÍ, Sumba–VB, B71–HB og KÍ–NSÍ. Anna› vikuskifti ver›ur spælt solei›is: FS Vágar–NSÍ, B68–B36, GÍ–Sumba, VB–B71 og HB–KÍ.

Ta› hevur veri› ætlanin at fáa kappingarskipanina út í hesi vikuni. Arbei›i› ver›ur gjørt á Estra í Gøtu, og í FSF vóna tey, at hon ver›ur send út til feløgini í dag.

jh

Hagtøl

Bólkur 1

Sumba–NSÍ 0–5 (0–2)
0–1: Brynjolvur Nielsen 23
0–2: Sonni L. Petersen
0–3: Christian Høgni Jacobsen 74
0–4: Christian Høgni Jacobsen 77
0–5: Mortan Hansen 88.
Dómari: Oddmar Andreasen

Stø›an

NSÍ	3	2	0	1	8–2	6
KÍ	2	2	0	0	8–3	6
SUMBA	3	1	0	2	3–10	3
VB	2	0	0	2	2–6	0

Bólkur 2

B36–ÍF 6–0 (4–0)
1–0: Jens Kristian Hansen 2.
2–0: Jákup á Borg 3.
3–0: sjávmál 5.
4–0: John Petersen 43.
5–0: Jákup á Borg 62.
6–0: Dánial P. Johansen 82.
Dómari: Suni Johansen

B71–B68 1–3 (0–2)
0–1: Fró›i Benjaminsen 11.
0–2: Súni Frí›i Johannesen 37.0–3: Marcello Marcolino 52.
1–3: Rúni í Soylu 63.
Dómari: Kim Ejdesgaard

Stø›an

B68	4	4	0	0	15–3	12
B36	4	2	0	2	16–6	6
ÍF	4	1	0	3	3–14	3
B71	4	1	0	3	3–14	3

Bólkur 3

HB–FS Vágar 2–1 (1–1)
0–1: Birgir Joensen 31.
1–1: Bár›ur Mortansson 32.
2–1: Símun Elisen 74.
Dómari: Lassin Isaksen

GÍ–TB 8–1 (4–0)
1–0: Helgi L. Petersen 10.
2–0: Rúni Justinussen 20.
3–0: Pauli Jarnskor 28.
4–0: Hans Pauli Petersen 37.
5–0: Jóan Petur Olsen 59.
5–1: Teitur Rasmussen 75.
6–1: Helgi L. Petersen 81.
7–1: Bartal Eliasen 86.
8–1: Rúni Justinussen 88.
Reytt kort: Óli Hansen , GÍ, (tvey gul) 56. og Tór›ur Mortensen, TB, 68.
Dómari: Birgir Sondum

Stø›an

GÍ	3	2	1	0	9–2	6
HB	3	2	1	0	8–2	6
FS Vágar	4	1	2	1	7–4	5
TB	4	0	0	4	1–27	0